## Kvinnurnar venja

A-landsliðið hjá kvinnum í hondbólti er væl á veg við sínum fyrireikingum til komandi Challenge Trophy-kappingina. Ein partur av tí var dysturin ímóti danska U18-landsliðnum herfyri, men nú eru ikki fleiri dystir áðrenn kappingina. Í staðin verður vant dúgliga, og landsliðið møtist í ítróttarhøllini í Kollafirði nú fríggjakvøldið til venjing í tveir tímar.



## ÍF vann kappingina

ÍF vann í gjár finaluna í Eysturoyarkappingini, sum ÍF sjálvt hevði tikið stig til. Í finaluni vann ÍF 2-0 á Víkingi, eftir at B68 fyrr um dagin hevði vunnið 3-1 á NSÍ í dystinum um triðja plássi. Báðir innleiðandi dystirnir leygardagin, NSÍ-Víkingur og B68-ÍF, endaðu við javnleiki 1-1 og máttu avgerast við brotsspørkum.



– Eg eri ikki hann, sum stendur og geylar í skiftingarrúminum, sigur Harald Bjørgvin, ið hevur tikið við venjarauppgávuni í Vestmanna sum eitt óløgi

Mynd: Álvur Haraldsen

# Bjørgvin bjargar barndómsfelagnum

**Síðan Harald Bjørgvin setti seg í venjarasessin í Vestmanna er støðan fullkomiliga broytt. VÍF hevur vunnið seg av aftasta plássinum og er nú á finalukós. – Eg havi bara givið teimum tað, sum restaði í, sigur venjarin**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

Hann hevur tikið við venjarauppgávuni í Vestmanna sum eitt óløgi. Við sínum siðiliga og friðarliga framferðarhátti er hann farin í herna móti afturhaldssinnaða hugburðinum hjá vestmenningum. Úrslitini tala eisini sítt greiða mál. Við lágvaksna Haraldi Bjørgvin við stýrisvølin miða vestmenningar nú brádliga aftur eftir hæddunum í føroyskum hondbólti.

Men hann hevur ikki hug at gera stórvegis hóvastak burtur úr sínum avrikum. Honum dámar ikki reiðiliga at vera í andglettinum, men heldur at úrslitini skulu tala sína søk. Og eingin váðar sær at seta fingurin á hansara arbeiði. Tí við seks stigum av seks møguligum hevur hann prógvað sítt virði.

### Hugburðsbroyting

Jónleif Sólsker hevði ongantíð fingið fótin fastan í venjarastarvinum, tá hann gavst sum venjari hjá VÍF í farna mánað. Vestmenningar avrikaðu langt frá tí, teir vóru mentir, og støðan varð so hættislig, at stoltleikin í Vestmanna, besta mansliðið hjá VÍF, var á niðurflytingarplássi. Tí fekk Harald Bjørgvin seg veruliga royndan, tá hann loysti Sólsker av. Men eitt miðvíst arbeiði við hugburðinum hjá leikarunum hevur víst seg at rigga framúr væl.

– Eg havi bara givið teimum tað, sum restaði í. Jónleif Sólsker hevur heilt víst givið teimum væl í beinini, tí rennimynstrini eru júst, sum tey skulu. Eg havi serliga lagt dent á at sett leikararnar upp til dystirnar, tí annað hevur ikki verið neyðugt. Eg eri ikki hann, sum stendur og geylar í skiftingarrúminum. Ítøkiliga og siðiliga havi eg greitt teimum frá, hvat hevur riggað væl og hvat, vit skulu broyta, sigur Harald Bjørgvin.

Uppgávan í Vestmanna er hansara fyrsta sum høvuðsvenjari. Í farna kappingarári hjálpti hann til við kvinnunum hjá Neistanum, sum endaðu á triðja plássinum. Harald Bjørgvin ger onga roynd at dylja, at hann stórtrívist í venjaraleiklutinum við evstu ábyrgdini.

– Tað er mest sum sjálvsagt, tí higartil hevur gingið serstakliga væl. Eg eri sera stoltur av úrslitunum, sum eg og leikararnir hava framt. Vit hava reist okkum eftir fáum vikum, og tí er uppgávan vorðin meira áhugaverd enn væntað, greiðir Harald Bjørgvin frá.

Tað er longu nú greitt, at hann ikki fer at standa á odda fyri VÍF eftir summarfrítíðina. Hann hevur játtað at hjálpt til í hesum kappingarárinum, men tíðin loyvir honum ikki at halda fram í sessinum.

### Sami málsetningur

Tað eru ikki meira enn tríggjar vikur síðan, at VÍF var besta boðið upp á ein komandi niðurflytara. Men síðan er fullkomiliga vent í holuni. Við trimum leikumførum eftir at spæla eru vestmenningar á veg í FM-finaluna.

Men kortini vil Harald Bjørgvin ikki hoyra talan um finalupláss og gullmerki. Hansara málsetningur var at varðveita sætið í deildini.

– Eg gjørdi greitt á fyrsta leikarafundinum, at vit fyrst og fremst skuldu vinna okkum av aftasta plássinum. Tað hevur eydnast. Men vit eru fullgreiðir yvir, at tað ikki eru fleiri enn trý stig niður til aftasta plássið. Fáa vit einki stig komandi vikurnar, eru vit av álvara í niðuflytingarvanda. Tí ræður um at fáa armarnar niður sum skjótast. Men sjálvsagt ynskja vit eitt finalupláss, sigur Harald Bjørgvin.

**VÍF-H71 29-25 (12-10):**

# Meistarar í trupulleikum

**Føroyameistararnir úr H71 eru nú á aftasta plássinum**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

Fyri einum ári síðan stríddust hoyvíkingar fyri at fáa fyrsta føroyameistaraheitið í hús. Tað eydnaðist. Men eitt ár seinni stríðast hoyvíkingar fyri at sleppa av aftasta plássinum.

H71 tapti í gjár uppiborið á útivølli móti VÍF, sum hevði við sær, at føroyameistararnir nú eru botnproppur í Atlantic Airways deildini.

Avgerandi løtan var eftir hvíldina, tá vestmenningar vunnu sær eina trygga leiðslu. Hóast H71 royndi at svara aftur, vann VÍF við 29-25.

## FAKTA

**VÍF-H71 29-25 (12-10)**
**10 min:** 3-2
**20 min:** 8-7
**40 min:** 20-14
**50 min:** 24-17
**Málskjúttar**
**VÍF:** Joen P. Høgnesen 6, Sámal Joensen 6 (1), Agnar Joensen 5 (1), Bjarti Hansen 4, Áki G. Olsen 4 (1), Áki Olsen 3, Sjúrður Poulsen 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 10 (5), Janus Sørensen 6, Esbern Patursson 5, Bárður Brimvík 1, Poul Kjartan Dam 1, Hans Kári Hansen 1, Rógvi Sørensen 1
**Brotskøst:** VÍF 5, H71 5
**Útvísingar:** VÍF 3, H71 5
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen